# Eivør fremst í Íslandi

**Umframt at liggja á fyrstu rók í Íslandi er Eivør Pálsdóttir nú eisini á veg í fram í Danmark, har danska útvarpið spælir nýggju fløguna nógv, og Radio Bigbandið ætlar at spæla inn tvey løg hjá Eivør á nýggja fløgu**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fløgan Krákan hjá Eivør Pálsdóttir er nú mest og skjótast selda fløga í Íslandi og er sostatt ovast á sølulistanum, har hon hevur verið í 15 vikur. Samstundis er hon ovast á ungdómshitlistanum Samfes. Har er sangurin »Við gengum Tvø« nummar eitt, og sostatt er íslendski ungdómurin eisini farin at lurta eftir Eivør.

At Eivør fekk íslendsku tónlistaheiðurslønirnar fyri stuttum hevur sett rættiliga ferð á søluna. Nú eru útvið 7000 eintøk seld í Íslandi.

Krákan er onnur føroyska fløgan, sum kemur á ovastu rók í Íslandi, tí Týr megnaði eisini at koma á fremsta pláss við Orminum Langa í 2002.

Eivør og fløgan Krákan eru nú eisini nógv at hoyra í donskum útvarpi og Radio Bigbandið hjá DR ætlar at spæla tvey løg hjá Eivør inn á nýggja fløgu, sum farið verður undir í næstum.





J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM




Bilur + 2 fólk til Danmarkar
úr 2.720,-

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs
úr 1.960,-

**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands
úr 1.420,-

**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands
úr 2.330,-

**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin



| Lágárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Cou-chettir | 4-koyggju-kamar, inn. | 4-koyggju-kamar, utt. | 3-koyggju-kamar, inn. | 3-koyggju-kamar, utt. | 2-koyggju-kamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE

# Høvdavirkið sólskinssøga á ráðstevnu í Norra

**Á eini ráðstevnu í Norra herfyri um, hvussu hjávørur av fiski kunnu gagnnýtast, var ein av stóru "sólskinssøgunum" Faroe Marine Products. Virkið er í Føroyum betur kent undir heitinum Høvdavirkið í Leirvík**

TÍÐINDASKRIV

*Vinnuhúsið*

Ein av íslendsku samstarvsfelagunum hjá høvdavirkinum, Ludvík Haraldsson frá Brim Seafood, greiddi frá á ráðstevnuni um, hvussu væl turking av toskarhøvdum, og marknaðarføringin av turkaðum vørum í Nigeria var eydnað.

Brim Seafood eiga nú 2 virkir í Íslandi og 45 prosent av høvdavirkinum í Leirvík. Ein av orsøkunum til at framleiðslan gongur væl er bílig orka. Spurdur um hvaðani føroyingar fingu bíliga orku, greiddi Ludvík Haralssson frá, at teir høvdu samstarv við eina ruskbrennistøð. Sostat kann burturbeining av ruski hjálpa til at gagnnýta størri part av fiskinum.

Tað var Rubin stiftelsen í Norra sum skipaði fyri ráðstevnuni í døgunum 28. og 29. januar. Av 210 luttakarum vóru 11 úr Føroyum.

Rubin er ein felagsskapur sum fiskivinnan á landi og sjógvi í Norra eigur saman. Rubin hevur sum endamál at virka fyri at gagnnýta alt av fiskinum og at menna virðisøkingina av hjávørum av fiski. Rubin metir at hjávørurnar kunnu um 5 til 10 ár umboða eitt norskt útflutningsvirði uppá meir enn 5 milliardir, tað vil siga meira enn virði av samlaðu flakaframleiðsluni í dag.





*Menningarstjórin saman við tveimum av starvsfólkum sínum; sitandi Cesar Bardo Rios, sum samskipar verkætlanina við tí nýggja suðureuropeiska kundanum, og standandi til høgru Edvard S. Joensen, tøkniligur leiðari av verkætlanini.*

# Vinna stórordra sum altjóða slóðbrótari

**Føroya Tele undirskrivar milliónaordra við suðureuropearar aftan á at stórur altjóða áhugi er uppstaðin fyri slóðbrótandi tøkni í skipanini hjá Televarpinum**

DIGITALT SJÓNVARP

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Tað mundi vera fáur sum grunaði at 'frystiboxin' skuldi gerast grundarlag undir einari glæsiligari nýggjari føroyskari útflutningsvinnu. Veruleikin talar tó fyri seg og úti á altjóða sjónvarps marknaðinum hevur ein alsamt vaksandi áhugi verið vístur Televarpinum; talan er nevniliga um eina av heimsins fyrstu kommersiellu skipanum ið gera brúk av terrestiskari senditøkni fyri digitalt sjónvarp t.e. sending á jørðini, via antennur, heldur enn kaðal ella satellit.

Í gjár var ein stórur dagur fyri Føroya Tele Consult, sum er ein nýggj deild hjá Føroya Tele sum hevur til endamáls at útflyta tøkniligar skipanir og loysnir til digital sjónvarps sendinet við serfrøði í terrestiskari senditøkni. Tá undirskrivaði Føroya Tele ein sølusáttmála í millióna klassanum við eitt suðureuropeiskt felag, um nýtslu av føroyskari tøkni á einari stórari oyggj í Miðjarðarhavs umráðnum.

Sum skilst er skipanin frá Føroya Tele Consult unik í sínari hátøknifrøði sum er ment í samstarvi við software menningar fyritøkuna og IBM umboðið Kervi.

– Tann føroyski marknaðurin fyri kunningar og fjarskiftis tøknifrøði er rættiliga avmarkaður, staðfesti Tróndur Djurhuus, menningarstjóri á Føroya Tele.

Tí hava vit eina grundleggjandi strategi í at víðka um marknaðin við at hyggja út um okkara landoddar. Vit hava eitt gott samstarv við millum annað føroyska ICT vinnu og hava verið úti um okkum fyri at skapa nýggj sambond uttanlands, til dømis gjøgnum at taka lut á messum og á annan hátt spreiða kunning. Tað vísir seg at áhugin fyri skipanini aftan fyri Televarpið er stórur og vit liggja longu í samráðingum um fleiri ordrar. Tann mest aktuelli og ítøkiligi er so tann ið nú varð undirskrivaður men aðrir sáttmálar eru eisini á veg, millum annað hava italienarar víst áhuga.

*Hvussu stórur er ordrin og hvør er keyparin?*

Eg kann vátta at talan er um millióna upphædd undir fyritreyt av at øll ætlað stig verða góðkend og gjøgnumførd og at keyparin er eitt suðureuropeiskt felag, meira kunnu vit í løtuni ikki siga. Vit mugu virða kundans støðu og tørv á diskretión í mun til hansara kappingarneytar… Tað snýr seg um eina samstarvs avtalu har vit lata teimum tøkniliga uppseting við meira til eina mótsvarandi skipan sum tann hjá Televarpinum.

Tøknifrøðin er ein týðandi partur av loysnini frá Føroya Tele, exemplifierað av tí sannroynd at Televarpið er ein so at siga optimalt hátøknifrøðilig fyritøka har alt sum kann er automatiserað. Skipanin hevur fingið umtalu í vinnuligum tíðarritum og á websíðum ymsastaðni og er blivin alsamt kendari. Okkara lítla og kompakta oyggja- og fjallaland hevur her víst eina kappingarliga styrki sum situr í at royndir kunnu skjótt gerast við skipanum sum tí hjá Televarpinum.

Televarpið hevur annars sambært egnar upplýsingar einar 3000 kundar á Klettunum. Í løtuni verður arbeitt við at víðka um tekningina soleiðis at Vestmanna og Vágar fyrst, og síðani onnur pláss, koma við í sendinetið. Sum skilst hevur Televarpið nátt break-even tá kundarnir eru komnir upp á umleið 3500. Eitt nýtt tiltak sum marknaðarliga skal differentiera mótvegis Canal Digital er Rás 1, ein opin kanal sum skal geva teimum ið vilja høvi til at sjónvarpa sítt tilfar.